


# Bíða við spenningi eftir Statoil-boringum

**Jan Müller**

18.05.2014 - 10:39

Oljan.fo

Statoil fyrireikar seg nú til at bora tríggjar leitibrunnar á Hoop-leiðini. Frammaundan er greitt, at Apollo, Atlantis og Mercury fara at geva týðandi upplýsingar, og at teir kunnu fá avgerandi týdning fyri, hvat fer at henda á Hoop-leiðini frameftir.

-Talan er um tríggjar av teimum mest spennandi brunnunum á norskum øki í ár, og vit eru sera spent upp á úrslitið. Her hugsi eg ikki bara um nøgd, men eisini um upplýsingar um økið, sigur Irene Rummelhoff, leitistjóri, við offshore.no.

Transocean Spitsbergen skal bora brunnin Apollo, og ætlanin er at byrja síðst í hesum mánaðinum. Beint aftaná verður farið undir hinar báðar.

Í Statoil vilja tey ikki siga nakað um sannlíkindini fyri at finna kolvetni, men tað er tó greitt, at spenningurin er stórur.

-Vit halda, at møguleikarnir á Hoop-leiðini eru stórir, sigur Irene Rummelhoff.

Hoop-leiðin er so mikið langt úr landi, at tað er neyðugt við rættiliga munandi nøgdum, fyri at leiðin skal vera rakstrarverd. Tí kann tað fáa avgerandi týdning, hvussu nógv verður funnið í teimum trimum leitibrunnunum, skrivar offshore.no.